# Løgtingið:
# Útfyllið spurnablaðið ella fáið bót!

**Tey, ið nokta at útfylla spurnablaðið í heyst, kunnu vænta sær eina bót. Løgtingið samtykti leygarnáttina umstrídda uppskotið um manntal, sum skal slóða fyri eini umfatandi fólkateljing í heyst.**

Finnur Jensen

*Ber tú nakað varandi brek?*
*Hvussu er heilsan hjá tær í mun til aldurin?*
*Er tú limur í nøkrum fakfelag?*

Hesar tríggjar spurningar og aðrar við hava vit skyldu at svara í heyst, tá fólkateljarar banka á dyrnar og biðja um útfylla eitt spurnablað. Um vit nokta, ella um vit svara skeivt við vilja, so kunnu vit vænta eina bót.

Tað er veruleikin, eftir at ein meiriluti í Løgtinginum leygarnáttina endaliga samtykti umstrídda uppskotið um manntal, sum skal slóða fyri umfatandi fólkateljing í heyst.

## Smávegis broytingar

Fleiri hava annars sáað iva um uppskotið, tí tað gongur privatlívinum ov nær. Bæði politikarar og løgfrøðisligir serfrøðingar hava róð framundir, at uppskotið er í stríð við bæði mannarættindi og grundlógina.

Løgtingið tók atfinningarnar til sín og beindi uppskotið aftur í nevnd. Men tá uppskotið kom úr aftur – nakrar tímar seinni – vóru broytingarnar fáar.

Í nýggja uppskotinum, sum varð samtykt, eru komnar nakrar nágreiniligari ásetingar um krøv og heimildir hjá sonevndu teljarunum, sum skulu banka á dyr og syrgja fyri, at fólk svara spurnabløðunum.

Men kravið um svarskyldu stendur við, og tey, sum nokta at svara ella svara skeivt við vilja, kunnu revsast við bót.


Royndarteljing november 2010

Skjal 9

HAGSTOVA FØROYA

manntal

**Royndarteljing**
Sum fyrireiking til ta stóru fólkateljingina í november 2011, verður í hesum døgum gjørd ein royndarteljing.
Manntal hevur valt 10 øki í landinum at gera royndarteljing í. Fimm í Norðoyggjum og fimm í Suðurstreymoy. Samanlagt eru umleið 1300 húski vald at vera við í royndarteljingini.
Tykkara húski liggur í valdu økjunum.
Vit vóna, at tit vilja hjálpa okkum at svara hesum spurnablaði.

**Innheinting**
Ein teljari frá Manntal kemur á gátt eftir spurnablaðnum innan fyri næstu tríggjar vikurnar. Í summum førum ringir teljarin og avtalar nærri, nær best er at koma eftir spurnablaðnum.
Teljarin er eisini til reiðar at hjálpa at útfylla spurnablaðið.
Á heimasíðuni manntal.fo er útgreinað vegleiðing til hvønn spurning.
Eisini ber til at ringja tel. 80 2011 og fáa vegleiðing.
Tilfarið frá hesi royndarteljingini verður einans brúkt til at bøta um spurnablaðið og at royna innskanning o.l. Bara hagtøl til innanhýsis nýtslu verða gjørd burtur úr tilfarinum.

**Legg til merkis**
Vinarliga leggið merki til hesar leiðbeiningar:

Hetta eru leiðbeiningar um, hvussu spurningarnir skulu svarast.

Er ivi um svarið, royn so at meta sum frægast.
Spurnablaðið er býtt upp í tríggjar partar. Ein um húski, ein um býli og ein um einstaklingarnar í húskinum.
Vinarliga latið øll í húskinum – sum eru før fyri tí – sjálv svara spurnapartinum til einstaklingin.

Takk fyri hjálpina!

1. november 2010

Heini Hátún, samskipari
Manntal

Vinarliga skriva adressuna hjá húskinum niðanfyri.

Postnummar FO –

**Hvør skal fylla spurnablaðið út?**
Hvør einasti persónur í húskinum skal takast við í manntalið.
Vit heita á ábyrgdarar í húskinum at fylla spurnablaðið út. Ein ábyrgdari er ein persónur sum:

- eigur/leigar (møguliga saman við øðrum) býlið; og/ella
- hevur ábyrgd (møguliga saman við øðrum) at rinda húsarhaldsrokningar og útreiðslur.

**Váttan**
Her skal skrivast undir av einum ábyrgdara í húskinum. Ansa eftir, at tú ikki hevur gloymt nakrar viðkomandi síður ella spurningar.

Hetta spurnablaðið er fylt út eftir bestu sannføring og vitan.

Undirskrift

Dagfesting | Telefonnummar

Vit seta okkum bara í samband við teg, um neyðugt er at fáa vantandi upplýsingar.

*Soleiðis sá forsíðan til spurnablaðið til royndarteljingina í heyst út. Í heyst skulu øll útfylla eitt líknandi spurnablað – annars fáa tey bót*

## Revsiheimildin finst longu

Í nýggja álitinum, sum varð skrivað, rættvísger meirilutin í fíggjarnevndini revsingina við at vísa á eina lóg frá 1991, sum longu gevur heimild til at sekta tey, ið ikki veita neyðugar upplýsingar.

Tað er lógin um Hagstovu Føroya, sum gevur stovninum heimild til at krevja sær slíkar upplýsingar.

Í § 5 stendur, at »tann, sum ikki rættstundis veitir tær upplýsingar, ið verða kravdar av honum eftir grein 3 og 4 við vilja ella við grovum ósketni veitir rangar upplýsinar, verður sektaður.«

## Í stríð við mannarættindi

Hinvegin hevur Birita Ludvíksdóttir, løgfrøðisligur ráðgevi í løgtingsumsitini í notati viðheft fyrra álitinum víst á, at svarskyldan kann vera í stríð við artikul 8 í evropeiska mannarættindasáttmálan, sum staðfestir, at øll hava rætt til virðing fyri sínum privat- og familjulívi.

Hóast sáttmálin góðtekur, at almenni myndugleikin í serligum førum kann gera inntriv í henda rættin til privatlív, metir hon ikki, at fólkateljingin er ein nóg góð orsøk til tess.

»Tað er ilt at fáa eyga á, at tað er "neyðugt í einum demokratiskum samfelag" at áleggja einum privatpersóni bót, um hann av onkrari orsøk ikki ynskir at svara ávísum spurningum í spurnarblaðnum,« skrivar løgfrøðisligi ráðgevin m.a. í notatinum til løgtingslimirnar.

## Í lagi at revsa

Kunningarráðgevin hjá Manntali, Øssur Winthereig, er hinvegin ikki samdur við løgfrøðiliga ráðgevan á løgtingsskrivstovuni ella minnilutanum í fíggjarnevndini um, at tað er skeivt at revsa tey, sum ikki vilja svara spurnablaðnum.

– Av royndum veit man, at tað ikki letur seg gera at fáa øll at svara, um tað verður sjálvboðið fyri borgarar at svara. Tí er tað mett neyðugt at áleggja fólki at svara spurningunum, sigur Øssur Winthereig.

Hann metir - í mun til løgfrøðiliga ráðgevan – at inntrivið er forsvarligt.

– Hendan skyldan fyri borgaran verður mett at vera eitt minni inntriv sæð í mun til nyttuna, sum samfelagið fær av úrslitinum av manntalinum, sigur Øssur Winthereig, sum sipar til, at alt Føroya fólk kann fáa ágóðan av tí, sum spyrst burturúr hagtalslýsingini í heyst.

*finnur@sosialurin.fo*

# Ætlar tú tær ikki at svara?

**Set teg í samband við okkum, um tú umhugsar at nokta at útfylla spurnablaðið í heyst.**

Finnur Jensen

**Ikki allir føroyingar eru so fegnir um, at teir skulu svara spurnablaðnum, sum kemur í hvørt húsarhald í heyst. Tað sæst á bæði portalum og kjak-síðum á netinum, har fleiri skriva, at tey beinleiðis ætla at nokta at svara spurningunum og kunnu sostatt vænta ein bót.**

**Hetta er áhugavert, tí um fleiri eru, sum nokta at svara og soleiðis ikki verða fevnd av fólkateljingini, dettur sjálvt grundarlagið undir fólkateljingini burtur.**

**Vit á Sosialinum ynskja tí fegin at vita, um fleiri føroyingar eru, sum ganga við hesum tonkum.**

**Send okkum ein meyl, har tú stutt greiðir frá, hví tú ætlar tær at nokta at útfylla spurnablaðið og annars um tú ert til reiðar at fáa eina bót fyri stríðið.**

**Adressan er: finnur@sosialurin.fo**

**Í mun til verkætlanina Manntal ætla vit á Sosialinum okkum ikki at avdúka tín samleika um 80 ár.**